# Posthúsið í SMS verður stongt

**Tað liggur greitt, at posthúsið í SMS í Havn verður stongt, nú sparingar skulu gerast í rakstrinum hjá Postverki Føroya**

POSTVERK
*Edvard Joensen*

14 ársverk skulu sparast á Postverkinum næsta ár fyri at fáa raksturin at hanga saman. Posthúsið í SMS verður stongt.

Tað eru greiðu boðini, Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya hevur at bera í samband við, at Postverkið hevur viðgjørt avleiðingarnar av sparingum á fíggjarlógini fyri næsta ár.

Hann sigur, at hálvtfimta ársverk verður spart burtur við beinleiðis uppsagnum.



*Posthúsið á Óðingshdd fær væntandi fleiri kundar, tá posthúsið í SMS verður afturlatið*

Av hesum verður bróðurparturin í Havn, sigur hann.

Hann sigur, at við teimum útmeldingum, sum komnar eru frá politiskari síðu, var greitt, at raksturin hjá Postverkinum fór at geva eitt hall upp á fimm milliónir krónur næsta ár, um einki varð gjørt.

Tá so politisk boð komu um, at tvær milliónir krónur til tænastumannalønir vórðu fluttar á fíggjarlógina, hjálpti tað nakað upp á trýstið. Men tað var ikki nokk, og tí verður neyðugt við øðrum sparingum eisini.

Umfram tey, sum verða søgd úr starvi, fara nøkur niður í tíð, onkur fer í farloyvi, og roknað verður við, at hálvttriðja ársverk kann sparast við natúrligari frágongd.

Umframt hevur Posterkið so sett upp, at fýra ársverk skulu sparast við rationaliseringum og øðrum sparingum.

Hetta skal gerast við at umskipa arbeiðsgongdir á Postverkinum, sigur Bergur í Garði.

Hann sigur, at Postverkið brúkar nógvar pengar til vaktarskipanir og yvirtíðararbeiði. Hetta verður nú lagt um og fer væntandi at spara stovninum nógvar pengar, sigur stjórin á Postverki Føroya, Bergur í Garði.

# Postavgreiðsla á bensinstøðini

**Møguleiki verður fyri, at vanligar posttænastur kunnu avgreiðast á bensinstøðini ella í handlinum, tá nýggja Postverkið er farið til verka**

POSTVERK
*Edvard Joensen*

Tá nýggja partafelagið, sum skal reka postflutning, er farið til verka, verður møguleiki fyri at fáa avgreitt vanligar posttænastur í bygdahandlinum ella á bensinstøðini, sigur stjórin á Postvekri Føroya, Bergur í Garði.

Nú landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur fingið heimild at stovna partafelag til postflutning, loysir tað Postverk Føroya úr ymsum bindingum og letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum. Møguleikum, sum tó hava verið kendir og royndir í grannalodnum okkara í nøkur ár, og sum tykjast virka væl.

Ein møguleiki er, at tá kunnu allar sonevndar fríar avgreislur leggjst út til feløg ella fyritøkur, sum avtala verður gjørd við um at avgreiða hesar.

– Tað vil siga slíkar avgreiðslur, sum ikki krevja beinleiðis peningaflutning, sigur Bergur í Gaði, stjóri á Postverki Føroya.

Hann nevnir sum dømi, at tað fer at bera til at gera avtalu við eina bensinstøð um at taka ímóti og lata út pakkar. Taka í móti brøvum og selja frímerki og annað tílíkt, sum ikki krevur beinleiðis flyting av peningi. Hesi, sum avtalað verður gørd við, sleppa at taka avgreiðslugjøld fyri at senda pakkar o.t., men sleppa ikki at flyta pening.

Tað fer so at hava við sær, at tænastan hjá einstaka borgararnum í fleiri førum fer at batna, sigur hann.

Her vísir hann til fleiri av smáu posthúsunum, sum bara hava opið heilt stutt tíðarskeið um dagin. Har er ringur møguleiki hjá fólki, sum er til arbeiðis, at avgreiða slík ting. Men verður hetta latið til dømis eini bensinstøð, sum er opin til seint á kvøldi, ber til hjá fólki at avgreiða slíkt, uttan at tað ávirkar eitt nú arbeiði.

Tað hevur verið arbeitt við hesum møguleikanum. Men tað verður meira ítøkiligt nú, nýtt partafelag verður stovnað, sigur postverkstjórin.

Sum almennur stovnur hava ymsar forðingar verið uppií. Eitt nú skal atlit takast til sáttmálan við Postfelagið, sigur hann. Tað fer at verða lættari hjá einum partafelag, enn tað er hjá einum almennum stovni, at gera serligar avtalur metir Begur í Garði.



*Við nýggja partafelagnum átast eisini nýggir møguleikar upp. Eitt nú at útlisitera postavgreiðslu til privatar fyritøkur so sum bensinstøðir og handlar, sigur Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya*

# Fyrsta stigið móti menning



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fer í næstum at stovna partafelag, sum skal loysa Postverk føroya av og taka yvir postflutningin í landinum*

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur fingið heimild at skipa Postverk Føroya sum partafelag. Bjarni Djurholm metir tað sum fyrsta stigið í eini menning av Postverkinum**

POSTVERK
*Edvard Joensen*

Landsstýrismaðurin við vinnumálum metir tað sum fyrsta stig til menning av Postverki Føroya, at hemild nú er fingin til at stovna partafelag, sum skal taka sær av postflutningi í Føroyum.

– Tað er sambært politiskari avtalu, at hetta verður gjørt nú, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Men ikki minst er tað tí, at tað í grundini hevur skund. Tað standa nevniliga 30 milliónir krónur tøkar til endamálið í ár. Verða tær ikki brúktar í hesum árinum, fella tær aftur til landskassan, og næsta ár verða tær ikki at finna á fíggj-arlógini.

Tað, sum nú verður gjørt, er at fáa stovnað sjálvt felagið. Lógir og reglur annars verða so gjørdar, so skjótt til ber, og so kann felagið fara til verka.

Nýggja partafelagið fær sum høvuðsuppgávu at reka postflutning, sigur Bjarni Djurholm. So verður tað up til leiðsluna í felagnum at gera av, hvussu tann flutningurin verður skipaður. Um tað verður eftir verandi skipan, ella onkur heilt onnur skipan verður funnin.

Men hann fegnast um, at nú kann fleagið fara til verka uttan at vera bundið av politiskum vilja ella óvilja til at gera tað ella tað.

Postverkið kann eftir nýggju skipanini ganga nýggja leiðir og finna nýggjar inntøkur, vísir Bjarni Djurholm á.

Hann nevnir Føroya Tele sum eitt dømi um alment partafelag, men sigur samstundis, at hesi bæði illa kunnu sammetast. Tí meðan Føroya Tele var eitt felag, har framgongd var á økinum, hevur Postverkið beint øvugtar fyritreytir. Har hevur bara verið afturgongd í seinastuni. Ikki minst orsakað av politiskum bindingum, sigur landsstýrismaðurin.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður sigur, at tað er ávísur lætti at sleppa av við Postverkið soleiðis politiskt.

– Nú verður tað upp til nevndina í nýggja felagnum at taka støðu til virksemið í framtíðini. Og eg gleði meg til at síggja Postverkið fara at mennast, sigur hann.



# Jóan Pauli Joensen nýggjur rektari

**Fróðskaparsetrið hevur setti Jóan Paula Joensen, professara, dr.phil & fil.dr. sum nýggjan rektara eftir Malenu Marnersdóttir**

STARVSSETAN
*tíðindaskriv*

1. desember 2004 tekur 59 ára gamli Jóan Pauli Joensen, professari, dr.phil & fil.dr. við sum rektari á Fróðskaparsetrinum. Hann tekur við eftir Maluna Marnersdóttur, professara, dr.phil, sum hevur verið rektari síðani 1998 í tvey valskeið.

Jóan Pauli Joensen hevur verið í starvi á Fróðskaparsetrinum síðani 1989, sama ári var hann tilnevndur professari í siðsøgu og fólkalívsfrøði. Í 1998 og 1999 var hann professari í etnologi við Universitetið í Bergen. Jóan Pauli Joensen sat eisini sum rektari frá 1990 til 1998.

Jóan Pauli Joensen hevur skrivað fleiri bøkur, millum annað Fiskafólk, sum kom út í 1982, Fólk og Mentan, sum Skúlabókagrunnurin gav út í 1987. Fyri jól í fjør kom út bókin 'I ærlige Brudefolk. Bryllup på Færøerne', fyri hesa hevur Jóan Pauli Joensen fingið virðisløn frá Kungl. Gustav Adolfs Akademin í Uppsala í Svøríki. Hann fær virðislønina fyri munagott ritverk innan siðsøgu og etnologi. Virðislønin verður handað 6. november.

Jóan Pauli Joensen hevur havt fleiri álitissessir í ymsum nevndum, bæði í Føroyum og uttanlands. Seinastu árini hevur hann verið formaður í Grundlógarnevndini, sum herfyri lat fyrra álitið til Løgmann.

Í Svøríki hevur hann verið formaður í serligari eftirmetingarnevnd, sum Högskoleverket hevði sett til at meta um grund- og granskaraútbúgvingina í etnologi við svensk universitet og hægri háskúlar. Álit var lagt fram um hetta í vár.

Regluligt rektaraval skuldi vera 2. november 2005. Freistin fyri uppstilling var 25. oktober. Bara eitt valevni stillaði upp, tí bleiv rektaravalið avgjørt við friðarvali.



*Eftir seks ára fráveru verður Jóan Pauli Joensen nú aftur rektari á Fróðskaparsetrinum*

# Høst í Føroyum

TÍÐINDASKRIV
*frá Listasavni Føroya*

29. oktober til 19. desember í 2004 verður Oluf Høst-framsýning í Listaskálanum.

Listasavn Føroya skal millum annað vísa nýtt í føroyskari list. Listasavn Føroya hevur í mong ár vónað at fáa í lag eina Oluf Høst-framsýning í Føroyum. Í ár hevur eydnast at gera avtalu við Oluf Høst Museet í Gudhjem at læna Listasavni Føroya ikki færri enn seksti av høvuðsverkum listamansins og soleiðis skapa grundarlag undir listaframsýningini Høst í Føroyum.

### Høst og Føroyar

"Eg leiti í roynd og veru í málningalist míni eftir tí tigandi guddóminum í náttúruni. Málningurin hevur ikki skapað listamálaran í mær, tað hevur sjálv náttúran."

### Oluf Høst (1884-1966)

At listamálarin Oluf Høst var so fast bundin at náttúruni og dugdi so væl at eygleiða tað, hann sá, hevur gjørt hann til ein tann mætasta listamann, Danmørk hevur átt. Listaverkini hjá Oluf Høst vísa, at hann alt sítt lív hevur roynt at lýsa havið, klettarnar og luftina á Borgundarhólmi, har hann er føddur og uppvaksin, og hetta ger tað, at málningalist hansara er so lík føroyskari málningalist.

Framsýningin Oluf Høst í Føroyum er partur í strembanini hjá Listasavni Føroya at vísa í Listaskálanum øðrvísi listaleiðir. Vit vilja lýsa evnið og formliga samspælið millum verkini hjá Høst og í føroyskari list. Sambandið millum Oluf Høst, sum málaði úr sínum útjaðara í heiminum, á Borgundarhólmi, og listina í einum øðrum útjaðara í heiminum, Føroyum, er sterkt, ikki bara hjá faðir at føroysku myndlistini, Sámali Joensen-Mikines, sum Oluf Høst hevði nógv samband við. Í myndunum hjá Sámali Joensen-Mikines sæst nógv av Oluf Høst, men eisini í nýggjari list í Føroyum. Náttúruromantikkurin og áhugin fyri tí metafysiska eru framvegis høvuðsrák í tí føroysku listini, rák, vit kenna aftur í listini hjá Oluf Høst, og sum lýsa eisini norðurlendska listasiðvenju.

### Upplatingardagur

Upplatingardagurin verður fríggjadagin 29. oktober klokkan 17-19, fjølmiðlarnir eru hjartaliga vælkomnir. Stjórin á Oluf Høst Museet, Jens Henrik Sandberg, setur framsýningina.

Fólk eru vælkomin at ringja á tlf. 313579 ella 214282 at seta seg í samband við savnsleiðaran at frætta meiri um framsýningina.

Tað ber eisini til at senda teldupost til inger@art.fo

# Suðuroyar Gospelfestivalur av bakkastokki um vikuskiftið

**Vikuskiftið hevur góðan tónleik at bjóða suðuroyingum og teimum, ið vitja Suðuroynna. Suðuroyar Gospelfestivalur fer fyri aðru ferð av bakka stokki**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Frá 28. til 31. oktober stendur gospel á breddanum í høllini í Trongisvági. Tá fara suðuroyingar, og onnur gospel áhugað, at syngja og venja gospel. Suðuroyar Gospelfestivalur er sprottin úr Suðuroyar Gospelkóri og er leiðarin, Jens Knudsen, ígongdsetarin. Ein av grundstuðlunum undir kórinum og festivalinum er seinni vorðin kend manna millum, nevniliga Guðrun Sólja Jacobsen.

Jens Knudsen leiðir festivalin, har fólk úr øllum Føroyum hittast at syngja gospel. Festivalurin er skipaður nakað soleiðis, sum ein t.d. kennir kórstevnurnar. Fólk hittast fríggjadag og venjing byrjar. Hildið verður á leygardag. Sunnudagurin er til venjing, roynd og gallakonsert av vanda tilfarinum. Tónleikabólkur er partur av tiltakinum.

Løgini á festivalinum hesaferð eru Just Come, God is Good, Til we meet Again, He's the light of the World, My life is in your hands, Blessed Assurance, It's Me, Det ska bli er betre plats, We thank you Jesus.

Atgongumerki til gallakonsertina sunnudagin kunnu keypast ein tíma innan konsertina, sum er klokkan 15.

Nærri ber til at frætta á heimasíðuni www.sgf.fo

# Útgávukonsertir í vikuskiftinum

TÍÐINDASKRIV

Teir báðir Kristleif Zachariassen og Knút Háberg Eysturstein, ið báðir eru fløguaktuellir, fara í næstum at hava tvinnar konsertir saman. Hesar vera í Losjuni í Gøtu fríggjakvøldið 29 oktober og í Margarinfabrikkini í Havn leygarkvøldið 30 oktober, har teir báðir trína á pall við hvør sínum bólki av dugnaligum tónleikarum.

Knút Háberg Eysturstein gevur út sína fyrstu fløgu 2 novembur. Henda fløgan nevnist "Havsglóð" og er tónleikurin yvirhøvur atmosferiskur og friðarligur, tó við blandaðum íblástri frá t.d rocki og electronica.

Henda framførslan verður sostatt fyrsta høvi hjá áhoyrarum at hoyra tónleikin av fløguni framførdan live.

Kristleif Zachariassen gav út sína fyrstu fløgu fyri stuttum, ið nevnist "Litleysir Blettir". Hetta er eitt savn av stemningsfullum sangum, ið hava sín uppruna í fólkatónleiki við eitt sindur av singer/songwriter og kontri swing blanda uppí.

Teir báðir hava valt at hava konsertir saman og verður tí høvi hjá áhoyrarum at hoyra teir framføra sama kvøld, undir sama taki.

Kristleif Zachariassen fer á pall saman við garvaðum og dugnaligum monnum sum Heðin Ziska Davidsen á el gittar, Arnold Ludvig á bass og Rógva á Rógvu á trummum. Teir kenna vit úr nógvum ymiskum samanhangum. Knút hevur savnað ein bólk av dugnaligum fólkum úr føroyska rock umhvørvinum. Hesi eru Bogi á Lakjuni (Clickhaze) á gittar, Haltóra Henriksen (Makrel) á tangentar, Niels Jákup í Jógvanstovu (Gestir, Makrel) á bass og Uni Árting (200, Mold) á trummur.

Høvi verður hjá áhoyrarum at ogna sær eitt eintak av bæði "Litleysir Blettir" og "Havsglóð" á konsertunum, ið altso vera fríggjakvøldið 29 okt í Losjuni í Gøtu og leygarkvøldið 30 okt í Margarinfabrikkini í Havn.

Báðar konsertirnar byrja kl 21.00.